# 7 Fylgiskjal 2

LANDSGRANNSKOÐANIN

Brot úr ársfrágreiðing

latin

løgtingsgrannskoðarunum

12. januar 2007

# 1 Almenni bygnaðurin

Flest øll lond í Evropa hava fyri fleiri árum síðani lagt miðvísar yvirskipaðar ætlanir um at gagnnýta menningina innan KT til at effektivisera umsitingina (digitalisering). Í hesum sambandi verða allir tættir í umsitingini endurskoðaðir, eisini verandi lóggáva, uppgávubýtið millum land og kommunur, málsøki, stovnar o.a. Skulu vit luttaka fult út í hesi gongd, er tað neyðugt, at tey grundleggjandi KT-trygdarviðurskiftini eru í lagi.

Landsgrannskoðanin hevur fyri fleiri árum síðani víst á, at almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betri skipaður/samskipaður, men hann er í stóran mun ein spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Broytingar innan lógarverkið, roknskaparverkið, uppgávubýtið millum aðalráð, stovnar, millum land og kommunu, millum landsstovnar og meira ella minni almennar grunnar o.s.fr. eru oftast farnar fram uttan nakað yvirskipað endamál.

Seinnu árini eru tó ávís framstig hend. Ein felags KT-depil undir Vinnumálaráðnum loysir í dag nakrar av teimum uppgávum, ið stovnar hvør sær áður skuldu loysa. Umleið 20% av landsstovnunum eru við í hesum samstarvi.

Framvegis hevur landsumsitingin eitt ótal av KT-skipanum, og tíðum hava alt ov smáar umsitingarligar eindir ábyrgd av at keypa, broyta, halda viðlíka, menna og reka skipanir, umsita net, trygd o.s.fr. Óneyðuga nógvir stovnar mega tí hava starvsfólk, sum hava kunnleika til kunningartøkni. Nógvar leiðslur megna ikki at taka á seg ábyrgdina av KT-skipanum, og verða uppgávurnar tí ofta uttan neyðuga leiðslustýring latnar privatum veitarum uppí hendi. Helst verður neyðugt at miðsavna fleiri uppgávur fyri at bøta um trygdina.

Tá ið eindirnar eru so smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið starvsfólk skifta arbeiði. Tað kann hava við sær vantandi siðvenju og vantandi upplæring av nýggjum starvsfólkum, sum tí ikki verða nóg dugnalig. Men sæð út frá einum heildarsjónarmiði er tað uppaftur verri, at ein stovnur nýtir dugnalig/yvirkvalifiserað fólk at loysa smáar/óneyðugar umsitingaruppgávur. Hesi starvsfólk høvdu kunnað gjørt stóra nyttu, har veruligur tørvur er á teirra evnum og dugnaskapi.

# 2 Effektivisering av umsitingini o.a. (GL 2001/1 01 0-9)

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar, grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nútímans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og frígeva starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

Í uppskoti til samtyktar í februar 2003 frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2001 (Lm. nr. 71-6/2002) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at kanna hesi viðurskifti nærri.

Í januar 2004 boðaði Fíggjarmálaráðið m.a. frá, at fyrimunirnir eru so eyðsýndir, at ikki skuldi verið neyðugt við nakrari kanning fyri at fáa tað staðfest.

Í november 2004 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at í sambandi við arbeiðið við løgtingsfíggjarlógini 2005 hevði Fíggjarmálaráðið biðið aðalráðini koma við ítøkiligum uppskotum, til tess at fremja sparingar, t.d. strukturbroytingar, talgildis- ella onnur tiltøk. Fíggjarmálaráðið ásannaði, at striltið hevði gingist at fáa nøkur ítøkilig uppskot.

Landsstýrismaðurin var ikki í iva um, at tað var skilagott av savna stovnar og fyrisitingar í størri eindir, bæði hvat viðvíkti KT-skipanum og bygnaði. Fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, krevjast fleiri fyritreytir:

- peningur skal verða settur av til umleggingina (tað verður dýrari, áðrenn tað verður bíligari),
- játtan skal flytast frá fleiri umsitingareindum til ta umsitingareindina, ið skal loysa uppgávuna í framtíðini,
- politisk semja skal fáast um broytingarnar,
- broytingarnar skulu hava undirtøku í umsitingini.

Í desember 2005 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hann á sínum øki arbeiddi við tveimum stórum rationaliseringsætlanum. Onnur var ein grundleggjandi umskipan av toll- og skattaumsitingini, og hin var ein grundleggjandi umskipan av virkseminum hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Eisini skuldi í 2006 verða farið undir at savna lønarútgjaldingar o.a. í ein lønardepil. Sambært landsstýrismanninum miðaðu hesar verkætlanir ímóti at savna eins uppgávur saman, bygnaðarliga og "fysiskt", og harvið skapa eina bæði effektivari og betri umsiting.

Landsstýrismaðurin ásannaði, at tað var sera tungt at fremja rationaliseringar í almennu umsitingini. Serliga høvdu nógvar forðingar verið í arbeiðinum at umskipa virksemið hjá Hagstovuni, Landsbankanum og Búskaparráðnum. Fíggjarmálaráðið var liðugt at evna til lógaruppskot at fremja nevndu umskipan, men uppskotini eru ikki løgd fyri Løgtingið.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Fíggjarmálaráðið hevur at kalla til fánýtis tikið stig til at samskipa ítøkilig uppskot á hesum øki. Landsstýrismaðurin vísir á fleiri fyritreytir, ið skulu til, fyri at tílíkar broytingar skulu hepnast, m.a. politisk semja um broytingar og undirtøka í umsitingini. Landsgrannskoðanin heldur, at her er enn eitt dømi um, hvussu torført tað er at loysa mál, har tað er neyðugt at samskipa og samstarva millum fleiri aðalráð. Landsgrannskoðanin vil mæla Landsstýrinum til at taka hesar spurningar til viðgerðar.

# 3 Kunningartrygd, søgulig gongd (GL 2001/1 02 0-2)

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum sínum seinnu árini kunnað løgtingsgrannskoðararnar um gongdina í málinum um stjórnan av kunningartrygd. Niðanfyri er ein stuttur samandráttur av søguligu gongdini seinastu 5 árini.

## 3.1 Samskifti við løgmann í 2001 um KT-trygd

Í skrivi til løgmann í august 2001 um stjórnan av kunningartrygd vísti Landsgrannskoðanin m.a. á, at arbeiðið í landsumsitingini at tryggja elektroniska partin av kunningarkervinum fer óskipað fram. Fólk sita hvør sær og stríðast við somu trupulleikum uttan at halda seg til viðurkendar standardar, og ógreitt er, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika KT-forum, DNL-ráðið og onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar verða, verða boð ikki fylgd.

Løgmaður ásannaði í oktober 2001, at enn var eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur ásettur og staðfesti, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði ábyrgdina av, at tað almenna hevði ein yvirskipaðan KT-politikk, umframt ein KT-trygdarpolitikk, ið skuldi taka støði í altjóða standardum innan stjórnan av KT-trygd.

Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett. Løgmaður legði dent á, at hvør landsstýrismaður hevur ábyrgd av KT-trygd og –tøkni á sínum øki.

## 3.2 KT-forum endurstovnað í 2002

Á vári 2002 endurstovnaði landsstýrismaðurin í vinnumálum KT-forum við hesum arbeiðssetningi:

- at orða uppskot til ein KT-politikk, umframt ein KT-trygdarpolitikk fyri lands-fyrisitingina,
- at fáa til vega eitt felags regluverk fyri KT-trygd,
- at gera tilmæli um at seta trygdarpolitikkin í verk,
- at leggja lunnar undir framhaldandi arbeiði við KT-trygd í landsfyrisitingini.

## 3.3 Uppskot til reglur um KT-trygd til hoyringar í 2003

Í august 2003 sendi KT-forum út til hoyringar hjá fleiri stovnum o.ø. "Uppskot til felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini", umframt skjølini:

- Bólking av krøvunum í ISO 17799.
- Bólkur B1 – Frágreiðing um trygdarkrøv sambært ISO 17799.
- Bólkur B2 – Frágreiðing um trygdarkrøv sambært ISO 17799.
- Lýsing av váða á KT-økinum fyri almennar stovnar.

Í uppskotinum til felags regluverk fyri KT-trygd verður m.a. mælt til, at:

- ein felags standardur fyri KT-trygd verður settur í verk fyri KT-trygdina í landsfyrisitingini,
- arbeiðið við KT-trygd í landsfyrisitingini verður grundað á:
- ISO 17799 standardin, og
- BS 7799-2, sum verður brúktur sum leiðbeining at byggja upp og reka KT-trygdarkervið,
- regluverkið verður "skyldubundið", og skal galda fyri alla landsfyrisitingina,
- standardarnir verða settir í verk innan 3 ár, og at byrjað verður við pilotverk-ætlanum á 5 stovnum.

## 3.4 Viðmerkingar frá stovnum o.ø. til uppskot til reglur um KT-trygd

44 stovnar, fyritøkur o.o. nýttu høvið at koma við viðmerkingum til uppskotið, ið varð sent til hoyringar. Í "Niðurstøður frá hoyring um felags regluverk fyri KT-trygd" 9. desember 2003 tók KT-forum samanum viðmerkingarnar. Yvirhøvur taka stovnarnir undir við regluverkinum, og at bygt verður á altjóða standardin ISO 17799, tó eru onkrir ivasamir og mæla beinleiðis frá at seta so høg mál.

Eitt nú verður í viðmerkingunum víst á, at:

- samband má vera millum trygd og kostnað,
- veruligi tørvurin má vera avgerandi fyri, hvussu nógv orka skal verða brúkt til KT-trygd,
- uttan "fíggjarliga uppbakking" er vandi fyri, at sjónligasta avleiðingin av regluverkinum verður kritiskar skoðanarfrágreiðingar,
- fáar fyritøkur tora at siga, at tær fylgja BS 7799-2 standardinum, tí skoðara-viðmerkingarnar verða hareftir,
- talan verður um eina sera krevjandi tilgongd fyri fyrisitingina, og 3 ár er ov stutt tíð at seta regluverkið í verk,

- vandi er fyri, at váðametingin er ov tíðarkrevjandi fyri hvønn stovnin, og hinvegin er vandi fyri, at farið verður ov lætt um váðametingina.

### 3.5 Tilmæli frá KT-forum í desember 2003

Í tilmæli sínum til landsstýrismannin mælti KT-forum m.a. til:

1. Eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár.
2. At brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2.
3. Broyting av KT-bygnaðinum.
4. Samstarv um at seta í verk regluverkið.
5. “Pilotverkætlanir”.
6. At stovna KT-deild.
7. At skipa fyri útbúgving/førleikamenning.

### 3.6 Rundskriv um KT-trygd 1. februar 2005

1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 byggir á ISO 17799 standardin, at arbeiðið við KT-trygd skal verða skipað sambært BS 7799-2 standardinum, og at tær hava sett í verk teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum stovnarnir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka.

Standardarnir, sum víst verður til í rundskrivinum, eru dagførdir í 2005. Landsgrannskoðanin hevur tí spurt Vinnumálaráðið, hvørjir standardar eru galdandi.

Í november 2006 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at KT-forum hevur viðgjørt spurningin á fundi í november 2006, og semja var um, at tann til eina og hvørja tíð galdandi ISO 17799 standardurin skal vera galdandi, og Vinnumálaráðið fer tí at broyta rundskrivið samsvarandi hesum.

Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum liggja skjølini, sum í august 2003 vórðu send út til hoyringar. Tá ið skjølini høvdu verið til hoyringar, vórðu tey tillagað í desember 2003. Vinnumálaráðið greiddi í november 2006 frá, at tað var eitt mistak, at skjølini, sum vórðu send til hoyringar, vóru at finna á heimasíðuni. Síðani eru skjølini tikin av heimasíðuni.

## 4 Kunningartrygd, støðan í dag (GL 2001/1 02 0-2)

Í 2006 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismenn, hvørjir landsstovnar o.l., sum teir varða av, lúka tey krøv, ið eru ásett um KT-trygd, og í hvønn mun landsstýrismenn/aðalráð hava umsjón við, at teir landsstovnar, teir varða av, lúka krøvini. Flestu stovnar lúka ikki krøvini, og landsstýrismenn/aðalráð hava so at siga ikki umsjón/eftirlit við, um stovnarnir lúka krøvini fyri KT-trygd. Niðanfyri verður kunnað gjøllari um úrslitið av kanningini.

### 4.1 Spurnaskriv til landsstýrismenninar

Sambært skrivi frá løgmanni 22. oktober 2001 skulu stovnar og landsstýrismenn taka stig til og tryggja, at KT-trygdin á teirra málsøki lýkur tey krøv, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur ásett.

Ein landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini á teimum málsøkjum, sum løgd eru til hansara, og tað áliggur honum, í rímiligan mun, at føra

eftirlit við og áseta reglur á sínum málsøki. Við heimild í stýrisskipanarlógini hevur løgmaður í kunngerð býtt málsøkini millum landsstýrismenninar.

Ein landsstýrismaður hevur yvirskipaða eftirlitið við stovnunum á sínum málsøki. Yvirskipað eftirlit merkir m.a., at landsstýrismaðurin/aðalráðið skal hava umsjón og eftirlit við, at stovnarnir fylgja ásettum reglum. Harafturat hevur landsstýrismaðurin heimild at geva stovnunum tænastuboð, í tann mun lóggávan ikki forðar tí.

Í skrivi 19. september 2006 bóðu vit allar landsstýrismenn um at greiða frá/skjalprógva, hvørjir stovnar, sum teir varða av:

- 1. februar 2006 luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd,
- ikki luku ásetingarnar 1. februar 2006, og hvussu støðan var í dag,

og hvussu landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur eftirlit/umsjón við, um stovnarnir lúka ásetingarnar í rundskrivinum.

## 4.2 Svar frá landsstýrismonnum

Løgmansskrivstovan

Løgmansskrivstovan og sendistovurnar lúka ikki ásetingarnar um umsitingarliga KT-trygd. LandsNet arbeiðir við at fáa henda partin í rættlag. Væntandi verður hetta arbeiðið liðugt miðskeiðis í 2007.

Innlendismálaráðið

Bert ein stovnur undir Innlendismálaráðnum leyk 1. februar 2006 ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd, men fleiri hava sett eitt miðvíst arbeiði í gongd.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at neyðugt verður at fara meira miðvíst til verka, fyri at allir stovnarnir skulu lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Fíggjarmálaráðið

Sambært landsstýrismanninum í fíggjarmálum siga 4 av 7 stovnum undir Fíggjarmála-ráðnum seg at lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Hinir stovnarnir arbeiða við at fáa viðurskiftini í rættlag. Fíggjarmálaráðið kann tó ikki siga, um stovnarnir luku treytirnar 1. februar 2006.

Fíggjarmálaráðið hevur latið Landsgrannskoðanini eitt yvirlit, har stovnarnir undir Fíggjarmálaráðnum eru bólkaðir í 3 ymisk trygdarstig, vísandi til bólkingarnar, ið KT-forum gjørdi í 2003.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hava landsstýrismaðurin og aðalstjórin regluliga fundir við stovnsleiðslurnar, har til ber at taka upp spurningin, hvørt stovnarnir fylgja ásetingunum í rundskrivinum um KT-trygd. Fíggjarmálaráðið heldur, at fyri teir stovnar, ið eru fevndir av "hægsta trygdarstigi" (Gjaldstovan og Toll- og Skattstovan) er hóskandi, at dagførd váðameting og skoðan av KT-kervinum verður framd við jøvnum millumbili.

Mentamálaráðið

Á heysti 2004 tók Mentamálaráðið stig til at gera eina váðagreining fyri stovnar og skúlar undir ráðnum. Váðagreiningin varð latin stovnsleiðarunum.

Hóast vit hava spurt tvær ferðir, sigur Mentamálaráðið seg ikki kunna svara, hvørjir stovnar lúka ásettu treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd. Mentamálaráðið fer at umhugsa at gera eina kanning.

Fiskimálaráðið

Fiskimálaráðið framdi fyrst í 2005 eina tvørgangandi verkætlan ímillum stovnar og deildir í ráðnum, har KT-trygdin varð sett í fokus. Fiskimálaráðið nýtti ein viðurkendan og góðkendan KT-grannskoðara til m.a. at gera váðametingar. Hvør deild/stovnur fekk síðani eina skrivliga váðameting, sum lýsti váðar viðvíkjandi kunningartøkni við støði í "trygdarkunngerðini". Fyri 1. september 2004 skuldu KT-kervini, sum eru fevnd av lógini "um persónsupplýsingar", lúka treytirnar í "trygdarkunngerðini".

Fiskimálaráðið og stovnar/deildir undir ráðnum lúka enn ikki tey strongu og víðtøknu krøvini í ISO 17799/BS 7799-2. Skal Fiskimálaráðið lúka krøvini, verður neyðugt við hægri játtan og fleiri starvsfólkum.

Nakrar deildir hava verið afturhaldin við at gera skrivligan KT-politikk, tí ivi er um, hvørt uppskotið um KT-politikk, sum Vinnumálaráðið skal koma við, kemur at galda fyri øll ella bara verður eitt ískoyti til verandi innanhýsis KT-politikk.

Hesin trupulleiki er ikki vorðin minni av, at KT-politikkurin hjá Vinnumálaráðnum hevur verið ávegis í fleiri ár. Sum nú er, hava deildir og stovnar undir Fiskimálaráðnum ein innanhýsis skrivligan KT-politikk.

Uppgávan hjá landsstýrismanninum at hava eftirlit við, um stovnar/deildir undir Fiskimálaráðnum fylgja ásetingunum í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum um KT-trygd, er løgd út til KT-leiðaran í ráðnum, og hann fylgir við menningini hjá stovnunum á KT-økinum.

Fiskimálaráðið vísir á, at valið, at nýta ISO 17799/BS 7799-2 sum grundarlag fyri KT-trygdini, er ein umfatandi verkætlan, sum tekur fleiri ár at seta í verk. Harumframt fevnir málið um kunning generelt og tískil eisini um fysiska handfaring av pappíri/skjølum. Tað er ein mannagongd, sum krevur, at peningur verður játtaður til endamálið, og at fleiri starvsfólk verða knýtt at, fyri at tað kann setast í verk.

Fiskimálaráðið vísir eisini á, at størsti munurin millum eina skjóta íverksetan av aðalkravinum (ISO 17799/BS 7799-2) og eitt longri skotbrá er, at almennu stovnarnir fáa álvarsamar viðmerkingar í árligu skoðarafrágreiðingunum. Tað fer í sjálvum sær ikki at hækka støðið.

Almanna- og Heilsumálaráðið

Bert tveir stovnar siga seg lúka ásetingarnar fult út ella møguliga lúka ásetingarnar. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur enn ikki sett nakrar fyriskipanir í verk fyri at kanna, hvørt stovnarnir, sum landsstýrismaðurin varðar av, lúka ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er uppgávan hjá landsstýrismanninum/aðal-ráðnum at skipa fyri beinleiðis eftirliti/grannskoðan av KT-trygdini á stovnunum. Tað skal leiðslan á stovnunum sambært ISO 17799 standardinum sjálv skipa fyri.

Á einum árliga afturvendandi evnisdegi fyri allar stovnarnar, sum hann varðar av, ætlar landsstýrismaðurin bert at spyrja stovnarnar, um teir hava framt eina árliga KT--skoðan. Á henda hátt kann landsstýrismaðurin hava eftirlit við, hvussu KT-trygdarstøðan á stovnunum er. Landsstýrismaðurin ætlar annars at eggja teimum stovnum, har eingin árlig KT-skoðan er gjørd, til at fáa tað í lag.

Vinnumálaráðið

Sambært Vinnumálaráðnum eru tað onkrir stovnar, ið siga seg lúka treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd. Bert ein stovnur segði seg 1. februar 2006 lúka trygdarásetingarnar í rundskrivinum.

Teir størru stovnarnir, sum hava fingið uttanhýsis serkøna hjálp, eru væl ávegis við trygdararbeiðinum, men teir flestu hava tikið stig til at innlima seg í rakstrardepilin hjá Vinnumálaráðnum og LandsNet, og eru tí fevndir av trygdarásetingunum har. Tað umfatar bæði fysisku og logisku trygdina o.s.fr. Tó er langt á mál til at lúka øll trygdarkrøvini sambært ISO 17799 og BS 7799-2, og er talan um eina áhaldandi menning.

Rakstrardepilin hjá KT-fyrisitingini lýkur ikki krøvini í rundskrivinum um KT-trygd. KT-fyrisitingin hevur gjørt eina tíðarætlan fyri, hvussu rakstrardepilin kann lúka krøvini í ISO 17799, og sambært KT-fyrisitingini má tað arbeiðið verða raðfest høgt. Arbeiðið er býtt upp í: váðameting, orða KT-politikk, KT-trygdarstrategi, verksetan, tilbúgvingarætlan og eftirmetan. Ætlanin er at fáa uttanhýsis hjálp at gera váðagreining/meting fyri rakstrardepilin, áðrenn KT-politikkurin verður gjørdur, og at arbeiðið verður raðfest høgt.

Samanumtikið kann sigast, at teir smáu stovnarnir mangla at gera eina váða-meting, trygdarpolitikk, trygdarstrategi, verksetan (m.a. skjalprógv), tilbúgvingarætlan og eina árliga skipaða skoðan.

Vinnumálaráðið arbeiðir í løtuni við at fáa eina skipaða eftirlits-/umsjónarfunktión at virka, eitt nú við regluligari vitjan á stovnunum og at hava umsjón við trygdar-arbeiðinum. Ein kunningartrygdarleiðari, sum áður var partur av KT-fyrisitingini, er settur til tað arbeiðið, og kunningartrygdarleiðarin er nú ein "stápsfunktión" í Vinnumálaráðnum.

Uppgávurnar hjá kunningartrygdarleiðaranum eru m.a., at:

- Hava umsjón við trygdaryvirvakingarskipanum; at gera váðametingar; at gera og dagføra KT-trygdarpolitikkin.
- At samskipa kunningartrygdararbeiðið í Vinnumálaráðnum og stovnum undir Vinnumálaráðnum, herímillum eisini á stovnum, har Vinnumálaráðið hevur tikið á seg ábyrgdina av kunningartrygdini (t.e. hjá stovnum, ið eru limaðir inn í LandsNet).
- At hava umsjón við, at KT-trygdarpolitikkur og atknýttar leiðreglur o.a. verða fylgdar.
- At veita ráðgeving í KT-trygdarspurningum.

## 4.3 Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini til spurnakanningina

Við støði í svarskrivunum frá løgmanni og landsstýrismonnunum er tað samanumtikið okkara fatan, at hvørki løgmaður ella landsstýrismenn hava eftirlit/umsjón við, um aðalráð og undirliggjandi stovnar, grunnar o.l. 1. februar 2006 luku treytirnar í rundskrivinum "um at seta í verk KT-trygd", og um stovnarnir eftirsíðan hava fingið viðurskiftini í rættlag.

Eftir øllum at døma er tað spurnaskrivið, sum vit í september 2006 sendu løgmanni og landsstýrismonnum, sum hevur fingið flestu aðalráð at kanna, hvørji aðalráð, undirliggjandi stovnar, grunnar o.l. lúka treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd.

Svarini hjá flestu landsstýrismonnum eru merkt av, at tað er metingin hjá undirliggjandi stovni av, hvørt stovnurin lýkur treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd, sum verður borin "ókritiskt" víðari. Landsstýrismaðurin/aðalráðið tykist ikki, sum liður í vanliga eftirlitinum/umsjónini við stovninum, at hava tikið støðu til, hvørt stovnurin lýkur ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd.

## 4.4 Eftirlitsvirksemið hjá Dátueftirlitinum

Sambært grannskoðanarlógini skal Landsgrannskoðanin m.a. ansa eftir, at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar. Út frá spurnaskrivum til avvarðandi landsstýrismenn og út frá grannskoðanarvitjanum í 2005 og 2006 hava vit staðfest, at flestu aðalráð og landsstovnar lúka ikki KT-trygdarkrøvini, ásett í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum.

Í fleiri førum er talan um samantvinnaðar KT-skipanir og mannagongdir, sum bæði fevna um búskaparupplýsingar, persónsupplýsingar o.a. Tað er tí sannlíkt, at flestu stovnar heldur ikki lúka øll tey formligu krøvini í lógini og í kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Vit kunnu í hesum sambandi eisini vísa til nakað av tí, ið landsstýrismaðurin í innlendismálum skrivar í viðmerkingunum til játtanina til Dátueftirlitið:

- 2006: “Eftirlitið kann staðfesta, at trygdartiltøkini enn ikki eru í lagi, og at trupulleikin er stórur innan landsumsitingina. Aðalráð og almennir stovnar hava tí eisini søkt um leingjan av freistini”.
- 2007: Einki starvsfólk verið í føstum starvi síðani 1. september 2006.
- 2007: “ES hevur sett sjøtul á at kanna eftir, um Føroyar á ein nøktandi hátt viðgera persónsupplýsingar samsvarandi ES lóggávu, og setir hetta enn størri krøv til Dátueftirlitið”.

Sambært § 37 í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum skal Dátueftirlitið m.a.:

- “ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini”,
- ”gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar”.

Um skerda virksemið hjá Dátueftirlitinum kunnu vit nevna sum dømi, at Almannastovan í mars 2006 søkti Dátueftirlitið um loyvi at leingja tillagingartíðina til 31. august 2006 fyri nøkur tiltøk og útseta onnur, sum krevja stórar skipanarligar umleggingar og eru kostnaðarmikil. Í november 2006 hevði Dátaeftirlitið ikki svarað skrivinum, helst tí onki starvsfólk er at taka sær av tílíkum samskifti.

Í januar 2007 hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum greitt frá, at í samráð við Dáturáðið hevur hann arbeitt fyri og fingið nøktandi játtan til Dátueftirlitið í 2007. Nýggjur stjóri er settur frá 1. januar 2007, og søkt er eftir einum løgfrøðingi og einum skrivstovufólki.

Aðalráð og landsstovnar, ið ikki lúka KT-trygdarkrøvini, ásett í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, lúka í flestu førum heldur ikki ásetingarnar í lóg/kunngerð um viðgerð av persónsupplýsingum. Talan er um at kalla somu formligu krøv, sum flest allir stovnar ikki lúka. Landsstýrismaðurin heldur, at hetta álvarsmál tí átti at verið loyst sum ein samskipað verkætlan, og hann ætlar at taka málið upp í Landsstýrinum.

# 5 Kunningartrygd, hví stovnar ikki lúka krøvini (GL 2001/1 02 0-2)

Niðanfyri hava vit roynt at vísa á nakrar orsøkir til, at so fáir landsstovnar í dag lúka krøvini um KT-trygd.

## 5.1 Týðandi tilmæli frá KT-forum verða ikki fylgd

Í august 2003 sendi KT-forum út til hoyringar eitt “Uppskot til felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini”. 44 stovnar, fyritøkur o.o. nýttu høvið at koma við viðmerkingum til uppskotið. Viðmerkingarnar førdu til, at KT-forum broytti tilmæli sítt á nøkrum økjum:

1. at seta eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár.
2. at brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2.
3. at broyta KT-bygnaðin.
4. at samstarva um at seta í verk regluverkið.
5. at nýta “pilotverkætlanir”.
6. at stovna KT-deild.
7. at skipa fyri útbúgving/førleikamenning.

Tilmælið varð síðani í januar 2004 handað landsstýrismanninum. 1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin fyri 1. februar 2006 lýkur ásettu krøvini.

Sum víst á, lúka flestu landsstovnar ikki krøvini, og ein orsøk kann vera, at fleiri týðandi tilmæli frá KT-forum í desember 2003 ikki vórðu fylgd. Niðanfyri hava vit greitt gjøllari frá hesum.

1. At seta eina 5-ára freist í staðin fyri 3 ár

Upprunaliga mælti KT-forum til eina 3-ára freist. Eftir at uppskotið hevði verið til ummælis, mælti KT-forum til at leingja freistina til 5 ár at seta í verk regluverkið, og at gera eina nágreiniliga ætlan um lutmál, sum skulu verða nádd ávegis.

Men sambært § 4 í rundskrivinum varð freistin í staðin fyri stytt til eitt ár.

Um orsøkina hevur Vinnumálaráðið í november 2006 víst á, at sambært ”trygdarkunngerðini” viðvíkjandi persónsupplýsingum skuldi KT-trygdin vera í lagi í 1. september 2004, men Dátueftirlitið kundi leingja freistina til í seinasta lagi 1. september 2006. Tí varð hildið ráðiligt at seta freistina til 1. februar 2006.

2. At brúka ISO 17799 standardin, men ikki BS 7799-2

Í januar 2004 handaði KT-forum landsstýrismanninum uppskot til “Felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini”, sum byggir á ISO 17799 standardin, m.a. tí at hann er mest brúkti standardur í heiminum, og tí at K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum” eisini byggir á henda standard, men farið varð burtur frá tilmælinum um at nýta BS 7799-2 sum leiðbeinandi standard fyri at byggja upp og reka KT-trygdarkervið. Hetta tilmæli varð ikki fylgt, og rundskrivið um at seta í verk KT-trygd vísir til báðar standardarnar.

3. At broyta KT-bygnaðin

Í tilmælinum í desember 2003 um at seta regluverkið í verk verður eisini víst til upprit 28. oktober 2003 frá KT-forum, “Upprit um KT-bygnaðin hjá landsfyrisitingini”, har

víst verður á, at ein broyting av KT-bygnaðinum er ein fortreyt fyri at seta stovnum so umfatandi krøv til KT-trygd.

Í innganginum til uppritið stendur m.a., at *"Tá arbeiðið við KT-trygdarpolitikki byrjaði í KT-forum, var tað greitt, at KT-bygnaðurin er ein av mest avgerandi faktorunum í tí, sum hevur við KT-trygd at gera, og at ein óhóskandi KT-bygnaður kann beina fyri annars skilagóðum royndum at betra um trygdina. Hetta er ein staðfesting av, at fyrisitingarligu eindirnar eru so smáar, vitanin so spjadd og bygnaðurin so óhóskandi samanskrúvaður, at uppgávan við KT-trygd gerst óverulig, um ikki nakað munagott verður gjørt organisatoriskt."*

KT-bygnaðurin er sum so ikki broyttur, men ein nýggj deild - KT-fyrisitingin - er sett á stovn í Vinnumálaráðnum.

## 4. At samstarva um at seta í verk regluverkið

Í tilmælinum í desember 2003 vísir KT-forum á, at nógvir stovnar eru so smáir, at teir hava ikki orkuna at átaka sær uppgávuna at byggja eitt KT-trygdarkervi upp frá grundini. Skulu tílíkir stovnar framvegis hava egið KT-kervi, er neyðugt at skipa so fyri, at teir onkursvegna kunnu koma lættari til málið.

KT-forum mælir til eitt víðfevnt samstarv og samskipan í landsfyrisitingini. Sum dømi um uppgávur, sum landsfyrisitingin kann gera í felag, og við tí spara arbeiðsorku, verða nevndar mannagongdir, forskriftir og vegleiðingar um at lúka einstøk krøv í standardunum; og at menna og kunna um hóskiligar arbeiðshættir, og amboð til at betra og lætta um arbeiðið hjá hvørjum stovni.

Við at loysa hesar uppgávur í felag, heldur enn hvør sær, kann verða tryggjað, at krøvini í standardunum verða tulkað eins allastaðni í landsfyrisitingini, og at hvør stovnur sær ikki hvørja ferð skal byrja frá botni. Nevnda samstarv og samskipan er ikki framt, soleiðis sum KT-forum mælti til.

## 5. At nýta "pilotverkætlanir"

KT-forum mælir til at seta "pilotverkætlanir" í verk á t.d. 5 stovnum, har hesir stovnar ganga undan við arbeiðinum at byggja upp KT-trygdarkervi, og at royndirnar hjá teimum koma øðrum stovnum til gagns. Stovnarnir skulu í støðd og virkisøki vera ymiskir og hava onkrar upplýsingar, ið koma undir lógina um persónsupplýsingar, og mælt verður frá at seta í verk pilotverkætlanir á størstu og KT-tyngstu stovnunum (t.d. á Almannastovuni, Gjaldstovuni og Toll- og Skattstovuni).

Endamálið við pilotverkætlanunum skal vera: at byggja upp KT-trygdarkervi til luttakandi stovnarnar; at landsfyrisitingin fær royndir við hóskiligum arbeiðsháttum; og at ítøkiligir myndlar o.a. tilfar spyrst burturúr, sum aðrir stovnar kunnu miða seg eftir. KT-forum mælir til, at pilotverkætlanirnar byrja skjótast til ber. Ongar pilotverkætlanir vórðu settar í verk, soleiðis sum KT-forum mælti til.

## 6. At stovna KT-deild

Í tilmælinum frá desember 2003 vísir KT-forum til serstakt tilmæli um at stovna KT-deild undir Vinnumálaráðnum. Deildin skal samskipa kunningartøkni í landsfyrisitingini og røkja uppgávur viðvíkjandi KT-trygd, m.a.:

- Halda regluverkið fyri KT-trygd viðlíka og útbyggja tað eftir tørvi.
- Gera uppskot til mannagongdir, forskriftir, skipanir og annað, sum skal verða gjørt fyri at lúka krøvini í trygdarstandardunum.
- Menna og kunna um hóskiligar arbeiðshættir og amboð til at betra og lætta um arbeiðið hjá stovnunum.
- Saman við skeiðsstovum at samskipa tiltøk í førleikamenning.

- Kunna seg um arbeiðið við KT-trygd í grannalondunum og kunna landsfyrisitingina.
- Samstarva við aðrar partar av samfelagnum um KT-trygd.

KT-fyrisitingin í Vinnumálaráðnum hevur ikki havt neyðuga orku til t.d. at samskipa tiltøk til førleikamenning, og tað hevur verið trupult at samstarva við aðrar partar av samfelagnum um KT-trygd.

KT-fyrisitingin tekur sær av kunningartøkniligari samskipan í landsfyrisitingini sum heild. Ætlanin er eisini at KT-fyrisitingin skal ráðgeva stovnum og ráðum um ætlanir fyri nýtslu av KT. Ráðgevingin verður rættað móti leiðslunum, soleiðis at tær verða betur førar fyri at taka støðu til, hvussu KT skal nýtast á teirra ábyrgdarøki.

Harafturat skal KT-fyrisitingin reka ein felags rakstrardepil og eitt ”net”, LandsNet. Vinnumálaráðið/KT-fyrisitingin hevur yvirtikið sonevnda “AHS-netið”, herímillum fysisku umstøðurnar, útgerð o.a. í húsunum hjá Landsapotekaranum. Í hesum hølum hevur KT-fyrisitingin bygt upp ein rakstrardepil.

Stovnarnir, ið knýta seg uppí rakstrardepilin, skriva undir avtalu, har víst verður til eitt fylgiskjal. Í avtaluni verður víst til § 8, Umsitingarøki, í fráboðan um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, kunngerð nr. 12 frá 1. apríl 2004, har ásett er, at *“Landsstýrismaðurin (í vinnumálum) útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Tá stovnur fær atgongd til felags undirstøðukervið o.t., tekur landsstýrismaðurin á seg ábyrgd viðvíkjandi trygd av felags skipanunum.”* Ábyrgdin av fakskipanum (t.e. búskaparskipanir og aðrar umsitingarligar skipanir) vil framvegis liggja hjá leiðsluni.

Ynskir ein stovnur ikki at verða ein partur av undirstøðukervinum, ið landsstýrismaðurin í vinnumálum útvegar, hevur leiðslan sjálv ábyrgd av KT-trygdini.

7. At skipa fyri útbúgving/førleikamenning

Í tilmælinum frá desember 2003 mælir KT-forum til, at KT-deildin undir Vinnumálaráðnum samstarvar við skeiðsstovur um at fáa til vega nøktandi skeiðstilboð og at virka fyri, at undirtøka fyri skeiðunum er í landsfyrisitingini.

Í uppískoyti til ”uppskotið um regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini” er gjørdur ein listi við skeiðstilboðum, sum KT-forum heldur vera neyðug at fáa til vega. Listin er býttur upp í almenn skeið og serskeið, og um hvørt skeiðið er ásett: skeiðsevni, málbólkur, væntað longd og innihald.

KT-fyrisitingin er ikki komin til at útvega skeiðstilboð, men hon tekur undir við at fáa til vega skeiðstilboð.

## 5.2 Vantandi eftirlit frá landsstýrismonnum/aðalráðum

Í september 2006 spurdu vit eisini landsstýrismannin/aðalráðið, hvussu tey høvdu eftirlit/umsjón við, at stovnarnir luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd, sum allar skuldu verða loknar 1. februar 2006.

Eftir svarunum at døma hevur onki skipað eftirlit verið við, um stovnarnir lúka krøvini. Tað tykist eisini vera sera misjavnt, hvussu landsstýrismenn fata leiklut sín á hesum øki. Ein stórur vandi liggur í, at stovnsleiðarar ofta fata spurningar um KT-trygd sum tekniskar trupulleikar, ið serfrøðingar skulu taka sær av. Ein uppaftur størri vandi liggur í, at fleiri aðalráð og landsstýrismenn tykjast hava somu fatan.

Fleiri ásetingar eru um eftirlit, sum landsstýrismenn/aðalráð skulu hava við stovnum á teirra málsøki.

Sambært stýrisskipanarlógini hava løgmaður og landsstýrismenn rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra

Sambært kunngerðini um býti av málsøkjum hevur ein landsstýrismaður yvirskipaða eftirlitið við stovnunum á sínum málsøki, og hevur heimild at geva teimum tænastuboð. Sambært løgmanni skal hvør landsstýrismaður taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar um KT-trygd, sum verða ásettir av Vinnumálaráðnum.

Sambært lógini um ábyrgd landsstýrisins kann løgmaður ella landsstýrismaður verða revsaður, skúgvar hann tilætlað ella av grovum ósketni til viks tær skyldur, sum liggja á honum. Hann kann eisini *"verða mettur at hava medvirkað til gerðina hjá einum undirmanni, tá hann, við ikki í rímiligan mun at hava ført eftirlit og ásett reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er vorðin framd."*

Landsgrannskoðanin heldur tað vera neyðugt hjá løgmanni at leggja áherðslu á tað eftirlit, ið hvør landsstýrismaður/aðalráð eigur at hava við stovnum á sínum málsøki, herímillum um stovnarnir lúka ásetingarnar um KT-trygd, tað verið seg sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, ella sambært lógini og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Á roknskaparliga økinum er hetta yvirskipaða eftirlitið formaliserað við, at undirliggjandi stovnar hvønn mánað mótvegis landsstýrismanninum/aðalráðnum vátta á einum serstøkum oyðiblaði (EK 76), at roknskaparligu viðurskiftini eru í lagi. Men tað eru so mong onnur øki, eitt nú KT, har yvirskipaða eftirlitið als ikki er skipað.

## 5.3 Almennur KT-politikkur ikki orðaður

Sambært skrivi løgmans frá oktober 2001 skuldi Vinnumálaráðið, við hjálp frá KT-forum, gera uppskot til almennan KT-politikk og KT-trygdarpolitikk. Í skrivi 13. august 2002 boðaði Vinnumálaráðið frá, at høvuðsdentur í fyrsta umfari varð lagdur á arbeiðið við KT-trygdarpolitikki. Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum hevur til fyri stuttum staðið ein skrivlig lýsing av arbeiðssetninginum hjá KT-forum. Har verður greitt frá, at *"tá verkætlanin "at fáa til vega eitt regluverk fyri KT-trygd" er liðug um stutta tíð, verður aftur arbeitt við spurninginum um yvirskipaðan KT-politikk fyri landsfyrisitingina."*

Enn er ongin KT-trygdarpolitikkur orðaður, og í november 2006 hevur KT-fyrisitingin kunnað um, at ætlanin er at taka spurningin upp í KT-forum, um tað framvegis er uppgávan hjá KT-forum at orða ein KT-politikk.

Landsgrannskoðanin heldur, at ein yvirskipaður KT-politikkur ikki kann verða gjørdur uttan samstundis at endurskoða almenna bygnaðin, við tí endamáli at effektivisera umsitingina, t.v.s. gera hana bíligari og betri.

# 8 Fylgiskjal 3: Høvuðsuppgáva um grannskoðan av stjórnan av KT-trygd í føroysku landsumsitingini

**Cand.merc.aud. –studiet**
**Institut for Regnskab og Revision**

## Kandidatafhandling

## Revision af styringen af IT-sikkerhed i den færøske landsadministration

Brynleif Poulsen

Beinta Dam

**Vejleder:**

Kurt Keldebæk Rasmussen

**Aflevering 12. juni 2007**
Handelshøjskolen i København 2007